## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum, við vitjan, gávum, fjarritum, uppringingum og tykkum sum hjálptu til.

Heilsan
**Jacob Reinert, Tórshavn**



## Lívfrøðingur ella bachelor í lívfrøði

Havlívfrøðiliga royndarstøðin søkir eftir lívfrøðingi til umhvørviskanningar á føroyskum firðum. Arbeiðið fevnir um at tilrættaleggja kanningar og taka lut í innsavningararbeiði, og at arbeiða tilfarið endaliga á kanningarstovu. Viðkomandi, ið settur verður skal eisini kunna átaka sær at arbeiða við teoretiskum verkætlanum og savnskendum uppgávum.

**Høvuðsuppgávur**
- At savna inn ryggleys djór
- Navngreining
- Hjálp til við ymiskum verkætlanum
- Skriva frágreiðingar
- Røkt av dýrasavni og ritsavni

**Førleikakrøv**
- Umsøkjarin skal hava útbúgving sum lívfrøðingur ella bachelor í lívfrøði, ella samsvarandi útbúgving.

**Fyrimunir annars**
- Kunnleiki til ryggleys djór
- Teldukunnleiki, serliga tekstviðgerð, rokniark, GIS og dátubasu
- At vera stinnur í føroyskum máli bæði í skrift og talu
- Duga at tosa og skriva enskt á brúksstøði
- Kunna sigla bát og duga vanligan sjómannskap
- Koyrikort
- Kaving

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður at seta skjótast til ber. Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Føroya Magistarafelag og Fíggjarmálastýrið. Starvið verður í fyrsta umfarið avmarkað til eitt ár. Møguliga verður starvstíðin longd.

**Umsókn**
við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða Havlívfrøðiligu royndarstøðini í hendi í seinasta lagi 11. februar 2002. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til leiðaran Jan Sørensen á tlf. 316111.

**Havlívfrøðiliga royndarstøðin**
180 Kaldbak • fax 316361



## Miðvágs Arbeiðarafelag

Aðalfundurin verður 16. februar kl. 16.00.

**Nevndin**


# Signar takkar fyri seg

**Signar á Brúnni stillar ikki upp til løgtingsvalið í vár, og nú tykist vegurin hjá Torbirni Jacobsen liggja víðopin inn í løgtingið. Formaðurin fyri Tjóðveldisflokkin harmast avgerðina hjá Signari**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Signar á Brúnni hevur boðað nevndini í Eysturoyar Tjóðveldisfelag frá, at hann fer ikki at stilla upp til komandi løgtingsval.

Hetta verður fyrstu ferð síðani 1970, at tjóðveldismaðurin í Fuglafirði ikki stillar upp á løgtingsvali.

Eysturoyar Tjóðveldisfelag hevði annan uppstillingarfund í Leirvík mikukvøldið, og tá kom tað fram, at Signar á Brúnni fer at gevast í politikki.

– Eg havi hugsað nógv um, hvørt eg skuldi halda fram, men eg eri komin til ta niðurstøðu, at eg fari ikki at stilla upp til komandi løgtingsval, sigur Signar á Brúnni.

– Tá tú hevur verið við í politikki í so nógv ár sum eg, so kemur tíðin eisini, tá tú skalt lata onnur fólk sleppa framat.

Ein uppstillingarfundur er eftir í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, og spurningurin er, um flokkurin fær roynda politikaran at broyta støðu.

– Nei, eg ætli mær ikki at broyta avgerðina, slær Signar á Brúnni fast.

Hann sigur, at stríðið um landsstýrissessin í fyrraárið einki hevur við hesa avgerðina hjá honum at gera. Tað er lagt afturum, sigur h

### Tveir toppskorarar burtur

Avgerðin hjá Signari hevur við sær, at vegurin hjá Torbirni Jacobsen tykist liggja víðopin inn í løgtingið.

Á seinasta valinum fekk Signar á Brúnni 286 atkvøður, meðan Tobbi fekk 232. Triði maðurin á listanum var Hans Tausen Olsen, sum fekk 145 atkvøTað er smeitur fyri tjóðveldislistan í Eysturoynni, at Signar ikki stillar upp, og smeitur kennist ivaleyst dyggari av, at Hans Tausen Olsen, sum var triðbestur seinast, heldur ikki stillar upp.

### Harmast avgerðina

Formaðurin fyri Tjóðveldisflokkin, Høgni Hoydal, sigur seg harmast um avgerðina hjá Signari um at taka seg aftur.

– Signar er ein av okkara mest royndu politikarum, og eg hevði vónað, at hann vildi taka eitt tak afturat fyri flokkin. Tí er tað harmiligt, at hann ikki stillar uppaftur, sigur Høgni Hoydal.

Ger hetta støðun hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni veikari til komandi val?

– Tað rokni eg ikki við. Nú er listin ikki endaligur enn, men eg vænti, at Eysturoyar Tjóðveldisfelag hevur nógv onnur góð fólk at seta á listan.

Kann avgerðin hjá Signari hava nakað at gera við stríðið um landsstýrissessin hjá honum?

– Nei, tað meti eg ikki.



*– Tá tú hevur verið við í politikki í so nógv ár sum eg, so kemur tíðin eisini, tá tú skalt lata onnur fólk sleppa framat, sigur Signar á Brúnni*

Tað málið var viðgjørt, sum tað skuldi í flokkinum, og Signar var eisini sjálvur við til at taka avgerðina. Bæði áðrenn og aftaná hava vit tosað væl saman, so tað hevur neyvan nakað við hesa avgerð at gera. – Eg vóni, at Signar vil arbeiða fyri flokkin, hóast hann ikki fer at stilla upp. Flokkurin hevur brúk fyri hansara drúgvu royndum í politikki, sigur Høgni Hoydal.

### Ungur á ting

Signar á Brúnni var fyrstu ferð valdur í løgtingið í 1970, og hann var tá yngsti løgtingslimur. Síðani 1970 hevur Signar stilla upp hvørja ferð, og bara eina ferð slapp hann ikki inn.

Tað var í 1980, tá Petur Reinert varð valdur á tjóðveldislistanum í Eysturoynni. Fýra ár seinni var Signar aftur í tinginum, og seinast í áttati árunum var hann leiðari í Tjóðveldisflokkinum.

Hann var við til at skipa samgonguna í 1989, og tá gjørdist hann eisini varaløgmaður. Hann hevur síðani sitið trý skifti sum landsstýrismaður í samanlagt fimm ár.

### Noyddist úr landsstýrinum

Í mars mánaði 2000 fór Signar á Brúnni úr landsstýrissessinum eftir at ivi var sáddur um embætisførsluna hjá honum. Ein kanning reinsaði seinni Signar fyri allan illgruna, men hann fekk ikki landsstýrissessin aftur, sum hann segði seg hava fingið lyfti um.

Tá núverandi sjálvstýrissamgonga varð skipað fyri fýra árum síðani, tóktist Signar á Brúnni vera eitt upplagt val til starvið sum løgtingsformaður, men politiska kabalin gekk øðrvísi upp, og Signar gjørdist landsstýrismaður við mentamálum.

Signar á Brúni er útbúgvin lærari. Hann hevur starvast meginpartin av tíðini í Fuglafirði, har hann eisini er ættaður, men hann hevur eisini verið lærari á Strondum og í Leirvík.

# Nýggj nevnd við rimmar dansitiltaki

DANSUR
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnudagin 20. januar hevði Dansifrøði aðalfun, har tveir nevndarlimir stóðu fyri vali. Edmund Nysted stillaði uppaftur, og varð eisini afturvaldur. Ann-Mary á Rógvi Rasmussen stillaði ikki uppaftur, og ístaðin fyri hana kom Jacob Rummerhoff. Nevndin, ið skipar seg sjálv sær nú soleiðis út: Erling Jørgensen, formaður, Jacob Rummerhoff, næstformaður, Árni Svartafoss, kassameistari, Edmund Nysted, skrivari og Karstin Hansen nevndarlimur. Sigrun Rubeksen varð vald, sum eykalimur.



*Nýggja nevndin í Dansifrøi er skipað, og verður skipað fyri stórum tiltaki í Norðurlandahúsinum í morgin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skráin fyri fyrru helvt av 2002 er løgd, og hon byrjar longu í morgin 26. januar, tá Dansifrøi hevur eitt stórt dansitiltak í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at felagið fyllir 30 ár. 144 fólk vera við í tiltakinum.

Tiltakið byrjar klokkan 15.00 og atgongumerki eru at fáa í Norðurlandahúsinum á 80 krónur.



# Ungir rúsevnismisnýtarar í Føroyum sleptir uppá fjall

**- Tað er átrokandi neyðugt, at ein viðgerðarstovnur fyri ungar rúsevnismisnýtarar verður settur á stovn beinanvegin. Spurningurin er, um Fyribyrgingarráðið er sína uppgávu vaksið, tá ið tað ikki tekur rúsevnismisnýtsluna í álvara og setur tiltøk í verk, sigur Erna S. Hákonardóttir, alkohol- og familjuráðgevi**

MISNÝTSLA
*Turið Kjølbro*



*- At senda ungar rúsevnismisnýtarar á viðgerðarstovnarnar, vit hava, er alt annað enn nóg gótt, sigur Erna S. Hákonardóttir, alkohol- og familjuráðgevi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Handtøkan av fleiri monnum, sum eru skuldsettir fyri at flyta inn og selja rúsevni í Føroyum, hevur enn eina ferð sett rúsevnismisnýtsluna á dagskránna. Í tí sambandi kom fram í fjølmiðlunum, at marknaðurin av rúsevnum í Føroyum er ógvuliga stórur og er alsamt vaksandi. Rúsevni, sum fyrr vóru óvanlig her á landi, eru í dag alt meiri vanlig. Alt annað líka sigur hetta okkum, at nógv fólk eru misnýtarar av rúsevni.

- Støðan er ógvuliga álvarslig. Eg havi í seinastuni sæð nógv ungfólk eksperimenterað við speed og hasj. Niðurundirkomnar mammur hava vent sær til mín av neyð, tí teirra børn eru í rúsevnum, sigur Erna Sigrún Hákonardóttir, sum arbeiðir sum alkohol- og familjuráðgevi í Havn.

### Serlig viðgerð

Ung við rúsevnistrupulleikum eiga at koma í eina viðgerð, ið serliga er ætlað hesum aldursbólkinum.

- Rúsevnismisnýtslan førir við sær so stórar heilabroytingar og -skaðar, at tað ræður um at fáa fatur á teim ungu sum skjótast. Fyrr tey verða hjálpt, størri møguleika hava vit fyri at hjálpa teimum. Annars missa vit tey.

- Eg síggi vaksandi trupulleikar av rúsevnum, og sum ráðgevi upplivi eg størsta maktarloysi, at vit ikki enn eru farin í gongd við at gera eina viðgerð fyri ung. Nógv dugnalig fakfólk eru í Føroyum, men hesi eiga at verða skúlað serliga í viðgerð fyri ung. Tað er rópandi neyðugt, at hetta verður gjørt beinanvegin. Verandi viðgerðarstovnar megna ikki hesa uppgávuna, ikki minst tí, at unglingurin ikki er fullvaksin. Heilt aðrir viðgerðarhættir verða brúktir til ungfólk enn til vaksin. Avrúsing av rúsevnum er nógv truplari og verri enn avrúsing av rúsdrekka. Tað er í grundini eitt kynstur at hjálpa misnýtarum burtur úr eini misnýtslu.

- Alla aðra staðni eru væl útbygdir viðgerðarstovnar til ung, nógva staðni eru skúlar knýttir afturat teimum soleiðis at tey ungu ikki missa skúlagongd. Vit eiga ikki at billa okkum inn, at vit ikki hava tørv á eini serligari viðgerð fyri ungar misnýtarar her.

### Myndugleikarnir sova

Einki bendir á, at ein slíkur viðgerðarstovnur verður settur á stovn.

- Tá ið okkara myndugleikar sova og ikki ynskja at tosa um hesi viðurskiftini, hendir einki. Teir halda væl standa til, tá ið vit hava tveir viðgerðarstovnar, men hvussu úrslitini eru á hesum stovnum gáa teir ikki um, ei heldur spyrja eftir. Út frá hagtølum, sum eiga at vera til um misnýtsluna sum er, eiga myndugleikarnir og eitt nú Fyribyrgingarráðið at seta í gongd tiltøk og fyribyrgingararbeiði av ymiskum slag. Soleiðis er í øðrum londum. Eg seti spurnartekin við, um Fyribyrgingarráðið er sína uppgávu vaksið, tá ið tað ikki tekur henda spurningin upp og viðger hann í álvara. Fylgir Fyribyrgingarráðið ikki við, hvat hendir í samfelagnum, veit eg ikki, hvat tað skal brúkast til. Hóast alt kókar um rúsevnismisnýtslu og annað misbrúk, letur Fyribyrgingarráðið ikki við seg koma. Eingin almennur fundur er hildin um evnið, ongar lýsingar verið, ongin upplýsing og so framvegis. Um fyribyrging er at halda fyrilestur á skúlum eina ferð um árið, er tað alt annað enn nóg gott, sigur Erna S. Hákonardóttir.

Erna S. Hákonardóttir hevur vent sær til Fyribyrgingarráðið, men er haðani víst til onkran annan.

- Tað letur til, at eingin tekur hesa gongdina í álvara. Eftir mínum tykki átti tað verið fremsta uppgávan hjá Fyribyrgingarráðnum at viðgjørt hesa ræðandi gongdina og sett tiltøk í verk.

### Máta misnýtslu

Eftir áheitan frá Ernu S. Hákonardóttir ber til á Apotekinum at bíleggja mátingarstokkar, sum máta, um rúsevni, heilivágur ella annað er í blóðnum. Eitt nú kann hasj mátast í blóðnum í upp til 36 dagar eftir, at viðkomandi hevur nýtt hasj seinastu ferð.


